# Sivic fingið nýtt venjarastarv

**Tomislav Sivic er nú settur sum venjari hjá FC Vozdovac Belgrade, sum í fjør endaði á fjórða plássi í bestu serbisku deildini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað gekst ikki sum ætlað, tá Tomislav Sivic skuldi seta seg í landsliðsvenjarasessin hjá Uganda. Sáttmálin var annars komin upp á pláss, men tá hesin skuldi undirskrivast, vóru tøl og treytir als ikki tær somu, sum partarnir annars vóru komnir ásamt um.

Síðani hevur fyrrverandi VB-, B36 og KÍ-venjarin leitað sær eftir nýggjum avbjóðingum, og hesar tykist hann nú eisini hava fingið.

Tomislav er nevnliga settur sum venjari hjá FC Vozdovac, sum spælir í serbisku superliguni, og tað er ikki frítt, at nógv verður roknað av nýggja venjaranum. Kappingarárið í fjør endaði Vozdovac á fjórða plássi, og tí er lítið at ivast í, at tað eru heiðursmerki og europeiskur fótbóltur, sum er málið, nú farið verður undir nýtt kappnigarár.



*Afrikanska ævintýrið varð av ongum, og nú verður tað í heimlandinum, at Tomislav Sivic skal virka sum venjari*

# Tórsvøllur munandi betri

Tað er ikki sørt, at tað líkist einum heilt nýggjum vølli, tá hugt verður at Tórsvølli í ársins útgávu. Atfinningarnar at kalla regnaðu oman yvir svørðin, sum í fjør mátti metast sum mest sum ónýtiligur. Boðini frá formanninum í grunninum, Poul Michelsen, vóru tá, at teir vóru í ferð við at kanna, hvussu vøllurin kundi fáast betri, og skal metast eftir fyrsta hálva árinum, so hevur hetta gjørt heilt góðan mun.

– Vit hava havt ein serfrøðing her uppi, sum hevur givið okkum holla ráðgeving um, hvussu vit best røkja vøllin. Millum annað taða vit munandi títtari nú, eins og vit við at spenna línur um vøllin í vetur hava forða mongu gæsnum í at seta seg, sigur Poul Michelsen.

Í aðrar mátar tykist vøllurin eisini betur røktaður sum heild, og úrslitini má sigast at vera sjónligt. Bæði leygar- og mikudagin hava dystir verið spældir, og enn er grasið grønari, enn tað nakran tíð var í fjør.

**-mørk**



*Tað hevur at kalla ikki bilað tað allarminsta, at Tórsvøllur innan fimm dagar hevur lagt gras til tvær ferðir 90 minuttir*

# KROSSORÐ




## Vinnari:

*Finn Bjørn Guttesen*
*Rugårdsvej 215, 1*
*Odense*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: HAVNARDALUR

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| H | A | V | N | A | R | K | O | N | U | R | | U | T | A | H |
| A | K | V | A | | | I | | I | T | E | M | | O | R | V |
| V | R | V | | O | K | | A | M | A | D | E | U | S | | Í |
| H | A | V | S | B | R | Ú | N | | | D | I | N | A | N | T |
| E | B | | I | A | | T | A | S | K | A | | I | R | I | S |
| S | O | R | T | N | A | R | | N | | R | T | | I | K | E |
| T | R | E | K | | R | Ó | S | A | N | | A | R | | L | R |
| U | G | G | A | R | | Ð | | R | I | T | U | R | | A | K |
| R | | N | | E | B | R | O | | C | E | | R | Á | S | |
| 464 | A | | | | B | A | | | | D | D | R | | | R |
| H | V | Í | T | A | B | R | Ú | G | V | | E | | L | E | E |
| E | F | F | I | E | | B | R | | | A | N | D | A | Ð | I |
| R | A | | M | G | | Á | V | Ø | K | S | T | | T | I | N |
| D | K | | I | | A | T | A | J | Ó | L | U | R | | N | A |
| I | S | T | A | N | B | U | L | | K | A | R | I | N | | S |
| S | A | N | N | A | | R | I | G | A | | | N | Á | T | T |

## Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. …« á bjálvan.

_ _ _ _ _

**Loysunar-orðið:** ............................................ **465**

Navn: ..............................................................

Bústaður: .....................................................

Bygd/býur: ....................................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ☐ **Okkara kokkar** – *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** – *Steinbjørn B. Jacobsen*
- ☐ **Ein farri av kolvetni** – *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** – *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ☐ **Villini súgdjór** – *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ☐ **Føroysk Flora** – *Jóhannes Jóhansen*
- ☐ **Havið** – *Bogi Hansen*
- ☐ **Íslandsklokkan** – *Halldór Laxness*
- ☐ **Grót og steinar** – *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***